

*Kirkjan, sum Gaudi teknaði, líkist einum ævintýrslottivið litføgrum tornum og fantasi blómum. Hendan kirkjan eitur La Sagrada Familia (tann heilaga familian). Hetta var Gaudi`sa mest ambitisiøsa verk. Tað er ei undur í, hví hendan ólidna kirkja er blivin størsta turist attraktión í Barselona.*



*Romansk list frá ár 900 til 1200 talið. Serliga vóru tað teir einføldu Fresku málningarnir, sum hoyra til teir bestu og størstu í heiminum. Hesir málningarnir høvdu serliga mín áhuga, tí litirnir minna ikki sørt um litirnar eg nýti í mínum stein málningum. Tað var áhugavert, at fáa at vita hvussu Fresko málningarnir vóru fluttir frá niðurløgdum katalanskum kirkjum við framkomnari tøkni.*

árini av lívi sínum búði Gaudi í kirkjuni, sum ein avbyrgdur einabúgvi. Hann metti sjálvur, at tað vildi takað 200 ár at fullføra verkið.

Nógva staðni runt um í Barcelona eru nógv dømi um hansara litfagra og fantasiríka stíl. Í 1926 var Gaudi yvirkoyrdur av einum sporvogni og doyði.

Kirkjan var langt frá liðug tá, og sum tann improvisator Gaudi var, lá eingin nágreinilig ætlan fyri kirkjuna, bert nakrar visionerar skitsur.

Fór á eina uttandura café at skoða kirkjuna.

Hugsaði um Gaudi og hansara stóru ætlanir og kom so at hugsa um Gunnhild Jacobsen, sum hevur tann fantasifulla urtagarðin í Kalbak, at tey høvdu hettar til felags at fáa okkum mennisku at rakna við. Tey gera nakað, sum er øðrvísi. Er tað ikki tað, ið list er millum annað, at skaka okkara vanliga hugsunarhátt ?

19. aprí vitjaði eg tað listarliga tjóðarsavnið, sum er tað størsta og vakrasta í Barcelona. Hettar er tann upprunaligi spanski tjóðpallurin, og var bygdur til heimsframsýningina í 1929. Frá trappunum, frammanfyri savnið, er sera eitt gott útsýni yvir messuhallirnar í Barcelona og Placa d´ Espanya við tí víðagitna gosvatninum. Savnið rúmaði romanska list frá ár 900 til 1200 talið. Serliga vóru tað teir einføldu Fresku málningarnir, sum hoyra til teir bestu og størstu í heiminum. Hesir málningarnir høvdu serliga mín áhuga, tí litirnir minna ikki sørt um litirnar eg nýti í mínum stein málningum. Tað var áhugavert, at fáa at vita hvussu Fresko málningarnir vóru fluttir frá niðurløgdum katalanskum kirkjum við framkomnari tøkni.

Eisini var ein framsýning við katalanskum málarum og samtíðarmonnum hjá Picasso, har tað var týðiligt at síggja, hvørjum øðrum hann m.a. hevði fingið íblástur frá.

Ein kallaðist Juli Conzaleis, livdi 1876–1942. Hann málaði eisini ræðuleikarnr frá borgarastríðnum 1936-39.

Ein av málarunum minti ikki sørt um okkara Torbjørn Olsen, hann var koloristur og æt Joakim Mir. Livdi 1873-1940.

Ein annar sum hugtók meg nógv var, Sidri Lonel, 1872-1911. Málaði daprar myndir av sigoynarum.

Ein annar var Franziska de Zubarán. 1598-1664.

Síðsta dagin í Barcelona tók eg mær av løttum. Fór mær ein túr aftur inn á Rambladina at hyggja eftir fólkum. Hóast Barcelona er ein nýmótans býur við øllum tí vakra, ið verðin hevur at bjóða og nógvum vælstandi, ja so møtir tú nógvum fólkum, sum ongan góðan eiga. Nógvir biddarar gingu her. Ein ung genta gekk við einum lítlum og barni bað um pening. Ein sat á einum stóli við ongum beinum, eisini nógvir sigoynarar stóðu við kirkjurnar og bóðu fólk, sum gingu



*- Ein av málarunum minti ikki sørt um okkara Torbjørn Olsen, hann var koloristur og æt Joakim Mir. Livdi 1873-1940. Ein annar sum hugtók meg nógv var, Sidri Lonel, 1872-1911. Málaði daprar myndir av sigoynarum.*

framvið, um pening.

Klokkan er nú 19:20, fríggjadagur er og vit hava tann 21. apríl. Siti í tokinum á veg aftur til Bilbau. Havi sitið og skrivað allan dag um tær upplivingar, eg havi havt higartil. Haldi, eg fari at gevast við at skriva meira á hesum sinni. Vónandi havi eg ikki troyttað tykkum ov nógv. Fari ta tíð, eg havi eftir her í Spaniu, at vera í Bilbau. Fái vitjan av vinmanni og floksfelaga mínum, Ludvíki Petersen mánadagin, og tað gleði eg meg til. So verður tað slutt bara at práta við seg sjálvan nakrar dagar.

Og so sum krúnan á verkinum koma mín elskaða kona og dótturin, Sigrun, til Madrid, dýrabiðidag 12. mai. Har verða vit 2 dagar. Fari sjálvandi at vitja Prado og Reino Sofia listaskálarnar og annað áhugavert har. Síðani fara vit til Bilbau at vera eina góða viku, til tann langi koyritúrurin til Danmarkar byrjar.

Hettar var so endin av frásøgnini hjá mær av "Ferð míni til Spaniu".